# Úr 12 upp í 1000 fólk

**Vanliga eru 12 fastbúgvandi mykinesfólk. Men leygardagin øktist talið við 988, tá útoyggjafólk og onnur hittust til stevnu**

STEVNA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Mykines:** Hátíðardagur var leygardagin, tá árliga Útoyggjastevnan varð hildin í vestastu oyggj okkara.

Mett varð, at eini 1000 fólk vóru í Mykinesi henda dagin. Hetta var ikki uttan orsøk, tí veðrið var av tí allar fagrasta til eina slíka stevnu.

Stevnan varð sett av Steingrimi Abrahamsen, síðani vartogtogan millum útoyggjarnar, har fugloyingar endurvunnu bragdið frá í fjør.

Seinnapartin vórðu túrar gjørdir í bygdini, har greitt verður frá ymiskum søguligum hendingum, m.a. um lívið hjá kenda listamanninum, S. J. Mikines.

Á skránni vóru annars framsýningar, fyrilestrar og ein spennandi filmssýning við upptøkum frá eldri døgum og fram til dagin í dag. Tað er Reðin Leonsson sum hevur gjørt hesar upptøkur í Mykinesi. Hesin filmurin varð vístur í fullsettum skúla fleiri ferðir, og tað var ikki frítt, at fólk tosaðu um, at hetta var hæddarpunktið á stevnuni.

Um kvøldið vóru eisini fleiri spennandi tiltøk, m.a. dansur, útifundur og annað. Vanliga búgva 12 fólk í Mykinesi, men henda dagin vóru tey minst 988 fleiri!

Enn er ikki avgjørt, hvar næsta Útoyggjastevnan verður.



*Eingin stevna uttan tónleik. Hesir báðir gingu runt í bygdini og hugnaðu um hjá stevnugestunum*



*Húsini hjá Reðini vóru eitt savningarstað hjá mongum gestum*



*Steingrím Abrahamsen setur stevnuna við eini røðu, har hann mintist aftur á fyrstu ferð sína til Mykines. Hann vísti eisini á møguleikar, sum bygdin hevur fyri at menna seg í framtíðini*





*Jens Kjeld Jensen greiddi frá um fuglalívið í Mykinesi. Í somu hølum var eisini ein málningaframsýning við verkum eftir kenda mykines-málarin S. J. Mikines*



*Ein av ídnu stríðsmonnunum fyri útoyggjunum er Tummas Frank Joensen úr Skúvoy, sum her er avmyndaður saman við konuni. – Henda stevnan vísir, at tað er dugur í útoyggjafólki, sigur hann*



*Fólk úr øllum landinum vóru komin til Útoyggjastevnuna – eisini úr Skúvoy*